## Sjey givnir síðani fyrstu ferð

Fyrsta ferðin Føroyar og Fraklandi spældu var 8. september 2004. Síðani hava liðini spælt tríggjar dystir aftrat. Nú verður farið undir fimtu uppgerðina, og nógvar broytingar eru framdar á liðnum hesi árini. Eitt nú eru sjey mans givnir, síðani fyrsta dystin. Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen og John Petersen hava allir spælt í móti Fraklandi, men spæla ikki longur. Fýra aðrir mans, hava eisini spælt í móti Fraklandi, men eru tó framvegis virknir fótbóltsleikarar, uttan at vera tøkir á landsliðnum. Hesir eru Marni Djurhuus, Jón Rói Jacobsen, Todi Jónsson og Claus-Bech Jørgensen.




## Forvitnast um Ribery

Á tíðindafundinum í gjár var størsti parturin av tíðini brúktur upp á at viðgera støðuna hjá Franck Ribery. Venjarin hjá Ribery í Bayern München í Týsklandi hevur gjørt greitt, at hann ikki ynskir, at Ribery spælir landsdystin í móti Føroyum. Kortini sendi Domenech boð eftir Ribery, sum hevur verið nakað skaddur seinastu tíðina, tá hann úttók landsliðið fyri tíð síðani. Spurningurin er so, um Domenech fer at gera eftir boðunum frá Louis van Gaal, venjara hjá Bayern München, ella um hann fer at brúka hann kortini. Ribery sær í øllum førum ikki út til at vera darvaður av nøkrum skaða, tí hann vandi saman við hinum í gjár uttan nakrar trupulleikar.



# Føroyar ímóti Fraklandi

*HM-undankapping, 8. september 2004*
**Føroyar-Frakland 0-2 (0-1)**
**0-1:** Ludovic Giuly, 32.
**0-2:** Djibrill Cisse, 73.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen – Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen – Jákup á Borg, Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen, Rógvi Jacobsen (Andrew av Fløtum, 75.), Claus Bech Jørgensen (Atli Danielsen, 83.) – Jónhard Frederiksberg (John Petersen, 69.)
**Venjari:** Henrik Larsen
**Áskoðarar:** 6.000 (útselt)

*HM-undankapping, 3. september 2005*
**Frakland-Føroyar 3-0 (2-0)**
**1-0:** Djibril Cisse, 13.
**2-0:** sjálvmál (Súni Olsen), 18.
**3-0:** Djibril Cisse, 76.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen – Mortan úr Hørg (Christian Høgni Jacobsen, 56.), Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen – Jákup á Borg, Ingi Højsted, Fróði Benjaminsen, Claus Bech Jørgensen (Heðin á Lakjuni, 76.) – Andrew av Fløtum, Todi Jónsson (Rógvi Jacobsen, 66.)
**Venjari:** Henrik Larsen
**Áskoðarar:** 45.000 (400 føroyingar)

*EM-undankapping, 11. oktober 2006*
**Frakland-Føroyar 5-0 (2-0)**
**1-0:** Louis Saha, 1.
**2-0:** Thierry Henry, 22.
**3-0:** Nicolas Anelka, 76.
**4-0:** David Trezeguet, 77.
**5-0:** David Trezeguet, 84.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Vagnur Mohr Mortensen, Fróði Benjaminsen, Marni Djurhuus – Jákup á Borg (Jónhard Frederiksberg, 88.), Mikkjal Thomassen, Pauli G. Hansen (Kári Nielsen, 46.), Símun Samuelsen – Christian Høgni Jacobsen, Rógvi Jacobsen
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**Áskoðarar:** 19.000

*EM-undankapping, 13. oktober 2007*
**Føroyar-Frakland 0-6 (0-2)**
**0-1:** Nicolas Anelka, 6.
**0-2:** Thierry Henry, 8.
**0-3:** Karim Benzema, 50.
**0-4:** Jérôme Rothen, 66.
**0-5:** Karim Benzema, 81.
**0-6:** Hatem Ben Arfa, 90.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen – Christian Høgni Jacobsen, Jón Rói Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Einar Hansen – Símun Samuelsen (Andrew av Fløtum, 86.), Súni Olsen, Mikkjal Thomassen (Rókur av Fløtum Jespersen, 78.), Hjalgrím Elttør (Bergur Midjord, 46.) – Rógvi Jacobsen – Christian Lamhauge Holst
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**Áskoðarar:** 1.890